# Trupult at fáa í lag semju um sáttmála

**Á aðalfundi í Heilsuhjálparafelag Føroya, minti Ása Olsen, formaður, limir felagsins á, at felagið nú stendur mitt í samráðingum um nýggjan sáttmála, og næsti samráðingarfundur verður, 30. apríl**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á aðalfundi hjá Heilsuhjálparafelag Føroya seinasta leygardag greiddi formaður felagsins, Ása Olsen, frá gongdini í farna ári.

Hon segði, at felagið alt seinasta ár var í samráðingum við Fíggjarmálaráðið, har avtalur vórðu gjørdar um eitt nú vaktargjøld og tilkallivaktir.

– Sjálvar sáttmálasamráðingarnar skuldu byrja í desember 2003, men av tí, at løgtingsval varð útskrivað, vórðu allar samráðingar útsettar til eftir valið. Tískil var fyrsti samráðingarfundur við Fíggjarmálaráðið, 23. mars, har felagið legði fram síni krøv og fekk at vita, hvørji krøv Fíggjarmálaráðið hevði.



*- Nú arbeiðsøkið hjá heimahjálpini er vorðið so umfatandi, er eisini neyðugt, at sáttmálin líkist meira øðrum sáttmálum innan hetta økið, segði Ása Olsen á aðalfundi hjá Heilsuhjálparafelag Føroya*

### Broytt arbeiðsøki

Formaðurin segði, at tá ið fyrsti sáttmáli felagsins varð gjørdur í 1990, líktist hesin nógv sáttmálanum hjá Føroya Arbeiðarafelag. Hon helt, at ein orsøkin var hon, at arbeiði hjá heimahjálpini tá var nógv øðrvísi, enn tað er í dag.

– Síðan vit fingu bólkarøkt, og arbeiðsøkið samstundis broyttist frá bert at fevna um økið úti kring um í heimunum, fevnir arbeiðsøkið hjá heimahjálpini í dag eisini um sambýlir og røktarheim.

Hon helt, at nú arbeiðsøkið hjá heimahjálpini er vorðið so umfatandi, er eisini neyðugt, at sáttmálin líkist meira øðrum sáttmálum innan hetta økið.

### Truplar samráðingar

Ása Olsen minti limir felagsins á, at Heilsuhjálparafelag Føroya nú stendur mitt í samráðingunum um nýggjan sáttmála, og næsti samráðingarfundur verður, 30. apríl.

– Tað er altíð ógvuliga trupult at koma afturumaftur fyri at fáa broytingar í sáttmálan, men nú hava vit tikið restina av teimum punktum, ið okkara sáttmáli er øðrvísi enn hinir sáttmálarnir, við í okkara krøvum. Tað verður neyvan so lætt at fáa í lag semju, tí krøvini kosta av samlaða karminum, segði hon.

# Uppskúlingin sæst aftur í heimarøktini

**Síðan heilsuhjálparaskúli kom í Suðuroy, eru fleiri og fleiri heimahjálpir uppskúlarar til heilsuhjálpara**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á aðalfundi felagsins, nam Ása Olsen, formaður, eisini við uppskúlingina til heilsuhjálpara.

Hon segði, at tá ið tann flokkurin, sum byrjaði á skúlanum í Suðuroy í apríl í ár, er liðugur, eru tveir flokkar eftir at uppskúla.

– Tá ið uppskúlingin er liðug, eru umleið 150 heimahjálparar uppskúlaðar til heilsuhjálpara. Hetta kann ikki annað enn síggjast aftur í heimarøktini.

Ása Olsen vísti á, at tað altíð eru nakrar kvinnur, sum av eini ella aðrari orsøk ikki taka av tilboðnum um uppskúling.

– Sjálvandi er tað ábyrgdin hjá heilsuhjálparafelagnum at syrgja fyri, at hesar eru líka tryggar í sínum størvum sum tær, ið hava verið til uppskúling, legði formaðurin dent á.



*- Tað er ábyrgdin hjá Heilsuhjálparafelagnum at syrgja fyri, at tær heimahjálpir, sum ikki eru uppskúlaðar, eru líka tryggar í sínum størvum sum tær, ið eru uppskúlaðar*



# Vælvirkandi felag við góðum kørmum

**– Vit hava eina vælvirkandi skrivstovu, har alt arbeiði felagsins verður gjørt**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta árið hevur verið merkt av nógvum trupulleikum hjá Heilsuhjálparafelag Føroya, og tað er serliga í Havn, at trupulleikar hava verið.

Hetta ásannaði formaðurin, Ása Olsen, á aðalfundi felagsins leygardagin.

– Orsakað av ymiskum trupulleikum, hava vit tvær ferðir verið noydd at kallað saman álitisfólkini í Havn.

Í hesum sambandi nevndi hon, at felagið skipaði fyri tveimum skeiðum fyri álitisfólki seinsta heyst.

### Limafundir

– Sum vanligt, hava vit eisini í farna ári verið kring landið og havt limafundir og hugnað okkum saman.

Hon helt, at hetta tykist vera eitt sera gott tiltak, ið tær flestu fegnast um.

– Á hesum fundum fáa vit sum nevnd eisini nógv betur innlit í, hvat rørist kring landið, segði Ása.



*- Sum vanligt, hava vit eisini í farna ári verið kring landið, har vit hava havt limafundir og hava hugnað okkum saman. Slíkir fundir geva nevndini eitt nógv betur innlit í, hvat rørist kring landið*

### Skrivstovan

Formaðurin vísti á, at skrivstova felagsins var bert opin ein dag um vikuna, heilt fram til árið 1996. Men tá ið skipaninar á økinum vórðu lagdar saman í 1996/1997, hendu rættiliga stórar broytingar, sum eisini fevndu um arbeiðsuppgávurnar hjá felagnum.

– Í 1996, tá ið vit tóku við, var eingin skrivstova, haðani alt arbeiði hjá felagnum varð gjørt. Tá ið brøv skuldu skrivast, ella felagið skuldi møta til ymiskar fundir, var sakførari altíð við. Sakførari skrivaði øll brøvini, sum fóru út av húsinum, segði hon.

### Á einum staði

Ása vísti á, at um hetta mundið var alt arbeiði hjá felagnum sera spjatt. Men nú er hetta ikki so longur.

– Hetta var tað fyrsta, vit fingu broytt, soleiðis at felagið í dag hevur eina vælvirkandi skrivstovu, har alt arbeiði verður gjørt.

Hon segði, at felagshúsið í dag líkist mest einum veruligum arbeiðsplássi.

– Her verða teir flestu fundirnir hildnir, eitt nú við leiðslu, myndugleikar og álitisfólk. Í dag eru tað eisini vit sjálvar, ið bæði orða og rokna út eitt nú krøvini til sáttmálasamráðingar.

### Nýggj lóg

Formaðurin segði, at eftir áheitan frá leiðaranum á skúlanum í Suðuroy, er Heilsuhjálparafelag Føroya við í arbeiðinum at gera uppskot til eina nýggja lóg fyri almanna- og heilsuútbúgvingar, har hesar skulu tillagast donsku útbúgvingunum.

Hetta merkir, segði Ása Olsen, at útbúvingarnar verða longdar við tveimum mánaðum.

# Heimahjálparafelag Føroya 25 ár á baki

**- Í sambandi við føðingardagin hevur felagið latið gera eina nál, sum flestu limir í hava fingið høvi at ognað sær á limafundum, sum verið hava kring landið. Nálin ber boð um, at vit hava eina fakliga vitan, sum ikki kann umverast, segði Ása Olsen**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var tann 26. mai 1979, at Heimahjálparafelag Føroya helt stovnandi aðalfund. Fundurin varð hildin á Hotel Hafnia, har 60 fólk vóru møtt til tess at leggja lunnar undir felagið.

– Tá ið tú lesur gerðarbøkur felagsins frá farnum tíðum, er ikki ov nógv, um sagt verður, at alt er nógv broytt hesi 25 árini.

Á aðalfundi leygardagin, tók formaður felagsins, Ása Olsen, eitt sindur aftur í søguna.

– Øll árini heilt frá 1985, tá ið felagið leigaði hølir á Háskúlavegnum og til núverandi nevnd tók við í 1996, var skrivstovan bert opin ein seinnapart um vikuna.



*– Vit eru ikki bara heima-og heilsuhjálparar, men vit eru tann parturin av heimarøktini, ið er úti, har brúkarin er. Tí kunnu vit ikki umverast. Fara vit til hús, verður ringur standur, segði Ása Olsen á aðalfundi í Heilsuhjálparafelag Føroya*

### Ein játtan

Hon vísti á, at nú hevur felagið, sum í dag eitur Heilsuhjálparafelag Føroya, ikki longur eina játtan fyri seg.

– Hinvegin er játtanin felags fyri alt økið, og hetta hevur merkt arbeiðið nógv hesi árini.

Ása segði, at tá ið sparast skal, er tað altíð fyrst hjá hennara limum, at spariknívurin rakar.

– Sjálvt arbeiði hjá okkum er eisini nógv broytt. Í sínari tíð varð størri dentur lagdur á tey meira húsligu tingini, men nú snýr okkara arbeiði seg í nógv størri mun um persónliga røkt.

### Føðingardagurin

Á aðalfundinum segði hon, at felagið í samband við føðingardagin hevur latið gera eina nál, sum flestu limir hava fingið høvi at ognað sær á limafundum, ið verið hava kring landið

– Men hví lata gera eina nál, spurdi hon? Og Ása svaraði sjálv:

– Jú, vit meta, at henda nálin er við til at markera okkum. Tá ið fólk síggja okkum við nálini, vita tey, at vit hava eina fakliga vitan.

Og Ása helt fram:

– Vit eru ikki bara heima- og heilsuhjálparar, men vit eru tann parturin av heimarøktini, ið er úti, har brúkarin er. Tí kunnu vit ikki umverast.

### Ringur standur

Hon vísti á, at ein leiðari kann umverast.

– Vit hava sæð nógvar innan okkara øki koma og fara. Men fara vit til hús, verður ringur standur, legði Ása Olsen, formaður í Heilsuhjálparafelag Føroya, dent á.